**Býráðsfundur mánadagin 05. november 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Steintór Jacobsen, Terji Lervig, Páll Isholm, Hans Mourits Foldbo, Jan E. Petersen og Tollakur Joensen, Hanna Jensen

**Ikki á fundi:** Fríðgerð Heinesen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

| | **Fundarskrá:** | **Fundarsamtykt:** |
|---|---|---|
| **1.** | **12/00308**<br>**2.viðgerð av eykajáttan til bátahylin á Toftanesi**<br>1. viðgerð var á seinasta býráðsfundi og tá bleiv samtykt at veita eykajáttan á kr. 3.800.000,00, og at peningurin verður tikin av innistandandi.<br><br>Eingin broyting er frá 1. viðgerð | Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð. |
| **2.** | **12/00362**<br>**Val av valnevnd til skúlastýrisvali** | Einmælt samtykt at velja Måns Persson, Eyðbjørg Lervig, Ove Heinesen í nevndina. |
| **3.** | **12/00315**<br>**Umhvørvisflokking**<br>Umhvørvisflokking er við í Byggisamtyktini.<br><br>Hetta vil undir vanligum umstøðum merkja, at henda flokking skal góðkennast í teknisku nevnd, sum eitt seperat skjal, ið eisini kann dagførast og broytast fyri seg fyri framtíðina, uttan at broyta byggisamtyktina (tað er jú nógv fleksiblari).<br><br>Verður umhvørvisflokking ikki samtykt, verður mælt frá at brúka hana í praksis, sum eitt slag av rundskrivi ella innanhýsisskjal.<br><br>Tekniska nevnd mælir til at fylgja tilmælinum frá teknisku umsiting, at royna nýggjar leiðir og gera brúk av einari Umhvørvisflokking. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd. |
| **4.** | **12/00352**<br>**Fyrispurningur um at taka burtur grundstykki – matr. nr. 389ac í Leirvík**<br>Í sambandi við dagføring av býarætlanini og viðgerð av øðrum líknandi máli fyrr í ár, er biðið um at fáa avgreitt um økið – matr. nr. 389ac - skal verða økispartur H, t.v.s. frílendi, eins og alt økið er omanfyri Bønhústoft. Fyrr í ár var matr. nr. | Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd.<br><br>**Atkvøður fyri:**<br>Jóhan Christiansen<br>Steintór Jacobsen<br>Terji Lervig |

**Býráðsfundur mánadagin 05. november 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Steintór Jacobsen, Terji Lervig, Páll Isholm, Hans Mourits Foldbo, Jan E. Petersen og Tollakur Joensen, Hanna Jensen

**Ikki á fundi:** Fríðgerð Heinesen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

389ab tikið burtur sum grundstykki og lagt um til økispart H.

Tekniska nevnd mælir til at matr. nr. 389ac og 389z verða strikað sum matriklar og økið verur lagt út sum áseting H, frílendi.

Jóhan Christiansen
Hans Mourits Foldbo
Páll Isholm

**Atkvøddi blankt:**
Tollakur Joensen

*Jan E. Petersen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

**5. 12/00327**
**Ferðslan frá rundkoyringini við Kráartanga í Leirvík**

Landsverk skal skelta vegirnar frá/til rundkoyringini við Kráartanga, og skulu vit taka avgerð um ferðsluna til/frá rundkoyringini og inn í bygdina. Hvørja bilstødd, vekt og nøgd skulu vit loyva at koyra eftir Kráarvegnum.

Ferðslunevndin mælir til at binda í rundkoyringina við Kráartanga við einvegis útkoyring frá bygdini. Tað skal verða møguligt hjá neystaeigarum at koma til neystini úti í Bug.

Skelta eingin innkoyring (innkoyring forboði) eftir Kráarvegnum til bygdina frá rundkoyringini.

Skelta “ Blindur vegur “ Samognarbøur/á Bakka til vinstru.

Tekniska nevnd mælir til at fylgja tilmælinum frá ferðslunevndini.

Einmælt samytkt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd.

**6. 12/00329**
**Umsókn frá Flóvin Tyril í Norðragøtu**

Flóvin søkir um loyvi at fáa innkoyring til grundstykkið hjá sær matr. nr. 111b, innkoyringin er frá vegnum inn til Lækna-støðina, matr. nr. 112b, og inn á grund-stykkið hjá Flóvin.

Støðutakan til umsóknina um loyvi at koyrafrá vegnum inn til Læknastøðina og inn á grundstykkið hjá Flóvin.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd.

**Býráðsfundur mánadagin 05. november 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Steintór Jacobsen, Terji Lervig, Páll Isholm, Hans Mourits Foldbo, Jan E. Petersen og Tollakur Joensen, Hanna Jensen

**Ikki á fundi:** Fríðgerð Heinesen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

Ferðslunevndin mælir til at geva loyvi til innkoyringina, men kommunan tilskilar sær rætt til at uppsiga loyvið við 3 mánaðar uppsókn, um so er at umstøðurnar við nýtslu av økinum í umhvørvinum broytast.

Tekniska nevnd mælir til at geva loyvi til innkoyringina til matr. nr. 111b frá vegnum inn til læknastøðina uttan treytir.

**7.** **12/00336**
**Umsókn um eitt viðmæli og møguliga keyp av jørð í Leirvík**
Festari Erikur á Húsamørk søkir um viðmæli til at keypa 2 partar av matr, 194a, nevnt Húsamørk. Eisini søkir Eirikur um at keypa ogninar matr nr. ag og matr. nr. 194 g, sum báðar eru ogn hjá Eysturkommunu.

Tekniska nevnd mælir til at viðmæla at Festarin keypir partin av matr. nr. 194a sum liggur millum matr. nr. 316 og 319.

Tekniska nevnd mælir til at býráðið fyrst tekur avgerð um alt økið matr. nr. 194a skal verða sum áseting H.

Meirlutin í teknisku nevnd mælir frá at selja matr. nr. 194g. Minnilutin Terji Lervig mælir til at selja stykkið, grunda á at sunnari parturin av økinum er selt øðrum keypara og skapar hetta precedens.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd viðv. matr. nr. 194a, millum matr. nr. 316 og 319.

Viðv. matr nr. 194g mælir fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá meirlutanum í teknisku nevnd, og at kommunan ger økið til parkeringspláss skjótast gjørligt.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 05. november 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Steintór Jacobsen, Terji Lervig, Páll Isholm, Hans Mourits Foldbo, Jan E. Petersen og Tollakur Joensen, Hanna Jensen

**Ikki á fundi:** Fríðgerð Heinesen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

**8. 12/00075**

**Býarplanur og byggisamtykt**

Samtykt var á býráðsfundi tann 24. september 2012 at leggja fyriliggjandi uppskot til býarplan og byggisamtykt fram til almenna hoyring. Staðfest er, at nakrar tillagingar og rættingar skulu gerðast áðrenn uppskotið verður lagt alment fram.

Tekniska nevnd mælir til at góðtaka dagførda býarplanin við tveimum minni broytingum.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd.

**9. 12/00298**

**Umsókn frá kirkjuráðnum í Leirvík um at seta pumpubrunn upp**

Ástaðarfundur hevur verið, kanningar eru/verða gjørdar við atliti til Kunngerðir, krøv og loyvir frá øðrum myndurleikum.

Tekniska nevnd mælir til at Leirvíkar kirkja fær byggiloyvi til pumpubrunnin á havnalagnum, men treyta av, at kommunan onga fíggjarliga ella aðra ábyrgd hevur av brunninum (veiting, grevstur, tyrving, trygging, skaða v.m.), tekniskari skipan, rørleiðingum, funktionaliteti, viðlíkahald ella annað sum er knýtt til hesa skipan.

Einmælt samtykt at ganga umsóknini á møti. Umsitingin ger sáttmála millum umsøkjaran og kommununa um treytinar fyri loyvinum.

**10. 10/00136**

**Bátahylurin og umhvørvið rundan um bátahylin undir Gøtueiði**

Málið var umrøtt á fundi í Trivnaðarnevndini tann 10. sep. 2012.

Mikudagin tann 12.09.2012 er móttikið uppskot frá Landsverki um landsvegin ígjøgnum bygdina undir Gøtueiði. Uppskotið er ein partur av fyrr avtalaða flyting av landsvegnum og nýggja omankoyring til bátahylin.

Uppskot frá teknistovuni fyriliggur.

Teknisk nevnd mælir til at gera 1. byggistig sum fevnir um vegin til bátahylin/kajuna og at arbeiði verður gjørt sambært uppskotinum frá

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd og fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 05. november 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Steintór Jacobsen, Terji Lervig, Páll Isholm, Hans Mourits Foldbo, Jan E. Petersen og Tollakur Joensen, Hanna Jensen

**Ikki á fundi:** Fríðgerð Heinesen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

Teknistovuni og játtan frá Kongshavnar Havn.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd.

**11. 12/00309**
**Hølisviðurskiftini hjá frítíðaransingini.**
Steintór Jacobsen hevur uppskot um at halda fram við ætlanini at út- og umbyggja hølini á Gásamýri (mál nr. 12/00175), og at sleppa ætlanini at byggja hølir til frítíðaransingina við við skúlan.

Málið var fyri á seinasta býráðsfundi tann 24. september 2012, og tá bleiv samtykt at útseta málið til komandi býráðsfund. Uppskotstillarin boðaði somuleiðis frá at hann vildi hava málið á skrá aftur til komandi býráðfund.

Tilmæli frá arbeiðsbólkinum fyriliggur til fundin.

Tollakur Joensen skjýtur upp, at málið verður beint í føstu nevndinar til viðgerðar, áðrenn støða verður tikin í málinum.

Fyrst bleiv atkvøtt um uppskoti hjá Tollaki Joenen

**Atkvøður fyri:**
Páll Isholm
Tollakur Joensen

**Atkvøður ímóti:**
Hanna Jensen
Steintór Jacobsen

**Atkvøddi blankt:**
Jan E. Petersen
Terji Lervig
Jóhan Christiansen
Hans Mourits Foldbo

Sostatt er uppskotið falli

Síðani bleiv atkvødd um uppskoti hjá Steintór Jacobsen og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Hanna Jensen
Steintór Jacobsen
Jan E. Petersen
Terji Lervig
Jóhan Christiansen
Hans Mourits Foldbo

**Atkvøður ímóti:**
Páll Isholm
Tollakur Joensen

**Býráðsfundur mánadagin 05. november 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Steintór Jacobsen, Terji Lervig, Páll Isholm, Hans Mourits Foldbo, Jan E. Petersen og Tollakur Joensen, Hanna Jensen

**Ikki á fundi:** Fríðgerð Heinesen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

Sostatt er uppskoti hjá Steintór Jacobsen samtykt

Páll Isholm og Tollakur Joensen hava tað viðmerking, at so týðandi mál eiga at verða viðgjørd í føstu nevndunum áðrenn støða verður tikin.

**12. 12/00076**
**Lutaíbúðir á matr. nr. 147b í Leirvík**
Uppskot um fígging fyriliggur.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til fígging.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**13. 12/00369**
**Umsókn um byggiloyvi til neyst, skúrðar, lugari v.m. við báthylin í Leirvík**
Bygginevndin fyri bátahylin søkir um byggiloyvi til 2 neyst, skúrðar, lugar/skrivstova v.m. sum skal byggjast fast í neystini sum Landsverk hevur bygt.

Tekniska nevnd mælir til at geva byggiloyvi.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd og at Eysturkommuna rindar fyri felagshølini.

Peningurin verður tikin av konto 7.38.14.511-20 (Bátahyljar)

Kostnaðarmetingin fyri felagshølini er 300.000,00 kr.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

## Býráðsfundur mánadagin 05. november 2012 kl. 19.30.

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Steintór Jacobsen, Terji Lervig, Páll Isholm, Hans Mourits Foldbo, Jan E. Petersen og Tollakur Joensen, Hanna Jensen

**Ikki á fundi:** Fríðgerð Heinesen

## Fundurin lokin kl. 23.30

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Tollakur Joensen ______________________________

Terji Lervig ______________________________

Steintór Jacobsen ______________________________

Jan E. Petersen ______________________________

Páll Isholm ______________________________

Hans Mourits Foldbo ______________________________

Páll Isholm ______________________________